FØROYA HANDILSSKÚLI



## Størv á Føroya Handilsskúla í Tórshavn

**Søkt verður eftir 2 ágrýtnum, nærløgdum og álítandi skrivstovufólkum til skrivstovu skúlans. Talan er um tvey fulltíðarstørv, at byrja 9. august og 15. september 2010.**

**Ábyrdarøki**
- Skráseting av næmingum, próvtølum o.a.
- Samskifti við næmingar og lærarar
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

Talan er um at loysa skrivstovuuppgávur innan miðnámsskúlaøkið og hægri útbúgvingar.

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving ella drúgvar skrivstovuroyndir,
- Hægri handilsprógv ella líknandi miðnámsútbúgving
- Hollan telduførleika – officepakkin o.a.
- Kunnleika at orða seg á føroyskum, donskum og enskum
- Góð evni at samstarva og samskifta
- Góðan tænastuhugburð.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum og viðkomandi skjølum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. mai 2010 og skulu sendast til:

Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
FO-110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Meira kunning um starvið fæst við at ringja til:
Tórhild Magnussen, skrivstovuleiðara

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 400 næmingar á gymnasialu yrkisútbúgvingunum (3-ára HH og 2-ára HH), og umleið 150 á yrkisútbúgvingini innan Fyrisiting, Handil og Skrivstovu (FHS), sum tekur eitt ár, og gevur atgongd til lærlingasútbúgving og til 2-ára HH, har FHS telur sum tað fyrsta árið av trimum. Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast umleið 35 lærarar og á Kambsdali umleið 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri skrivstovulærlinga- og handilslærlingaútbúgving og fyri hægri útbúgvingum sum HD og akademiútbúgving.

FØROYA HANDILSSKÚLI

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo



## Aðalfundur 2010

Aðalfundur felagsins verður
**týsdagin 27. apríl 2010 kl.10.00**
í Klingruni í Norðurlandahúsinum

Skrá sambært lógum felagsins.
Forkvinnu- /formansval er.

Kl. 9.30 morgunmatur
Kl. 10.00 aðalfundur

Gestarøðari: Dorthe Gyldenkærne um globalar rembingar og einstaklingin. Hugleiðingar um hvussu menniskjað letur seg ávirka av globalu viðurskiftunum.

**Almanna-og heilsurøktarafelagið**






LÆRLINGALÝSING

## Er tað tær vit leita eftir?

**Vit leita eftir røttu lærlingunum til handlar okkara í Klaksvík og til Landavegin í Havn. Og kanska er tað júst tær, ið vit leita eftir.**

**Ert tú ágrýtin**
og dámar at veita eina tænasta, ið gleðir onnur. Ert tú eisini ein, ið sær teg sjálva/n, sum tann, ið veruliga ynskir at gera munin. Og um tú hartil hevur viljan og hugin at røkka málið saman við okkum, so ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn.

**Um hetta kanska er tú**
So vildu vit fegin fingið eina skrivliga umsókn frá tær, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum innan 1. juni 2010.

**Lærutíðin, ið er 3 ár, inniber at tú hevur tikið FHS - prógv.**

**Send umsókn til:**

INN, Klaksvíksvegur 80, 700 Klaksvík
ella INN, Landavegur 103, 100 Tórshavn

inn



## Selja bilin?
– set hann í Sosialin!




Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo



## Skeið í massagu og kropsviðgerð



Um nóg nógv tekna seg hava massørarnir **Dániel Zachariassen** og **Gunna Højgaard** massaguskeið í Yndi Fitness yviri við Strond í Havn í døgunum 14. og 15. mai 2010.

Gunna Højgaard eigur og rekur Massageskolen í Studiostræde í Keypmannahavn. Skúlin byrjaði í 1976, so Gunna hevur verið virkin í næstan 35 ár sum massørur. Hon er ein av mest virdu massørunum í Danmark, har hon er væl kend innan hetta fak.

Dániel Zachariassen, ið hevur fingið sína útbúgving sum massørterapeut á Massageskolen, hevur sína egnu massaguklinik í Keypmannahavn, Mucle Care, í Nærum.

Massaguskeiðið er fyri øll sum hava áhuga í massagu og kropsviðgerð.

Tilmelding fer fram hjá Dániel Zachariassen, tlf. +45 41265248, teldupostur: dzac@kallnet.fo

Prísur: 1.800,00 kr. pr. luttakara.

Skeiðluttakarar fáa handað diplom eftir skeiðið.

**www.massageskolen.dk**
**www.muscle-care-dz.dk**